# ES fordømir dráp

ES hevur hvassliga fordømt morðið á russisku mannarætt-indastríðskvinnuna Natalja Estemirova, sum varð funnin myrde nærhendis kekenska býnum Nazran í gjár. Hon var skotin í høvdið. Svenski uttanríkisráðharrin, Carl Bildt, sum er formaður í ES í løtuni, sigur drápið vera eina illgerð, og hann mælir teimum russisku myndugleikunum til at finna teir seku og at revsa teir. Carl Bildt legði afturat, at drápið avdúkar, hvussu neyðugt tað er at verja mannarættinda-stríðsfólk í Russlandi. Natalja Estemirova var í ferð við at skriva um burturflytingar, píning og dráp í Kekenia, nú hon bleiv myrd har.



# Stórt arbeiðsloysi í Bretlandi

Arbeiðsloysið í Bretlandi var 7,6 prosent í mai, og so stórt hevur tað ikki verið, síðani Arbeiðaraflokkurin kom til valdið í 1997, sigur BBC, sum leggur afturat, at talið var størri enn væntað. Altjóða fíggjarkreppan hevur rakt Bretland sera meint við nógvum uppsagnum. Tær seinastu komu frá bilaverksmiðjuni Jaguar, sum koyrdi 300 fólk til hús. Fleiri av teimum størstu fyritøkunum í Bretlandi hava biðað síni starvsfólk góðtaka at fara niður í løn ella at arbeiða uttan løn eitt stutt tíðarskeið. Eitt nú hava umleið 8.000 starvsfólk hjá flogfelafnum British Airways játtað at arbeiða uttan løn nakrar dagar fyri at hjálpa arbeiðsplássinum.

# Blóðbankin fyrireikar ólavsøkuna

**Vit hava altíð nóg mikið av blóði inni, men tað eru tíðir, tá sannlíkið fyri at fáa brúk fyri blóði er størri enn vanligt, og ólavsøkan er ein av hesum. Tí tappa vit eyka nógv blóð nú, sigur Ragnhild Skarðhamar í blóðbankanum**

BLÓÐGEVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Ragnhild Skarðhamar, sum arbeiðir í blóðbankanum, sigur, at tey fegin taka móti øllum, sum melda seg til*

*Mynd: Leo Poulsen*

Blóðbankanum manglar ikki blóð, men hinvegin hava tey heldur ongantíð ov nógv.

- Hjá okkum ræður um at hava ein so stóran bólk av fólki sum møguligt at taka av. Tað skal altíð verða so, at fólk kunnu gevast eina tíð at lata blóð, antin tað so er av sjúku, fráveru, graviditeti ella bara tað, at tey fegin vilja hava eitt skotbrá. Tað skal ikki verða so, at fólk skulu kenna seg noydd at geva blóð, sigur Ragnhild Skarðhamar, ið starvast í blóðbankanum á Landssjúkrahúsinum.

Og tað gongur rættiliga væl at fáa nýggj fólk at melda seg til sum blóðgevarar.

- Tað er jú eisini eitt natúrligt fráfall av aldri og øðrum, og tí ræður alla tíðina um at fáa nýggj fólk inn í skipanina, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Nógv fólk koma av sínum eintingum, men tey koyra eisini lýsingarherferðir av og á og tá vísir seg, at áhugin er serliga stórur.

Sum kunnugt finnast fleiri typur at blóði, og blóðbankin hevur brúk fyri teimum øllum. Men tað er serliga ein blóðtypa, sum tey eru fegin um í blóðbankanum.

- Tað er ein blóðtypa, sum kann brúkast til øll fólk, og hon nevnist 0-Rhesus Negativ. Hana brúka vit, um støðan er so álvarslig, at vit ikki náa at staðfesta blóðtypuna áðrenn blóð skal gevast. Tí hava vit eisini hesa blóðtypuna í okkara sonevndu katastrofugoymslu at taka til, um ein stór vanlukka skuldi hent, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Hinvegin kunnu fólk við hesi blóðtypuni bert móttaka hesa. Annars eru mest vanligu blóðtypurnar í Føroyum 0-Rhesus Positiv og A-Rhesus Positiv.

- Og tað merkir eisini, at tað eru mest hesar typurnar, vit nýta, sigur Ragnhild Skarðhamar.

### Brynja seg til ólavsøku

Fólk, sum velja at gerast blóðgevar, eru tað gjøgnum alt lívið í flestu førum.

- Tað eru fólk, sum hava latið blóð 50 ferðir, og tað eru eisini fólk, sum hava latið 75 ferðir, og tað eru vit ógvuliga takksom fyri. Tað er týðiligt, at tey lata blóð við gleði, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Fólk fáa eina lítla viðurkenning, bæði tá tey hava latið 50 ferðir og tá tey hava latið 75 ferðir.

- Ja, tey fáa eina gullnál og eina rósu, so tað er ein ógvuliga hugnaligur dagur, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Tey tappa rættiliga nógv blóð á Landssjúkrahúsinum, og tað gerast til fleiri litrar um vikuna.

- Vanliga tappa vit eini 25-30 fólk um vikuna, men nú upp undir ólavsøku verða tað nakað meir, tí tá skulu vit hava eina størri goymslu, fyri at tryggja okkum upp undir tjóðarhøgtíðina, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Hvør blóðgevi letur 430 millilitrar, so eina vanliga viku tappa tey einar 11 til 13 litrar. Og upp undir ólavsøku altso nakrar litrar meiri. So eisini blóðbankin fyrireikar seg til ólavsøkuna.

Ynskja fólk at gerast blóðgevarar ber til at far inn á heimasíðuna www.blodgevi.fo og fylla eitt skema út, ella tey kunnu venda sær til blóðbankan og har fáa vegleiðing um, hvussu tey skulu bera seg at.

- Og tað er bara at halda seg til. Vit taka fegin móti øllum, sigur Ragnhild Skarðhamar.

Ávísar treytir eru tó, men tað fæst alt at vita á heimasíðuni ella í blóðbankanum.



*Kend og ókend, høg og lág geva blóð. Her Høgni Hansen, stjóri í Poul Hansen, heilsølu. Hann læt í gjár blóð fyri 59. ferð*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Borgarstjórin fyri 50. ferð

**Í gjár var Heðin Mortensen á Landssjúkrahúsinum, har hann læt blóð fyri 50. ferð**

BLÓÐGEVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen, borgarstjóri, er ein av trúgvu blóðgevarunum í Føroyum, og hann hevur nú latið seg tappað 50 ferðir.

- Eg haldi, at tað kom frá skótunum. Eg var gulur skóti, og eitt av aðalmálunum hjá skótunum er at hjálpa, so haðani stavar tað, sigur Heðin Mortensen.

Blóðgevarar kunnu lata blóð upp í fýra ferðir um árið, men so ofta hevur borgarstjórin kortini ikki latið seg tappað.

- Nei, tað er rætt. Tað man hava ligið um tvær ferðir um árið í meðal, sigur hann.

Heðin Mortensen hevur nógv eftirspurdu blóðtypuna 0-Rhesus Negativ, sum øll kunnu móttaka.

- Men havi eg sjálvur brúk fyri blóði, kann eg bert fáa mína egnu blóðtypu, sigur borgarstjórin.

Summi fólk ræðast beinleiðis nálir og sproytur, men tað borgarstjórin kennir als einki »óbehag« við at lata blóð.

- Nei, tað má eg siga, eg kenni meg væl við at lata blóð. Eg havi tað eisini fínt aftaná, sigur hann.

Karmarnir eru eisini vorðnir munandi betr, enn teir vóru fyrst hann byrjaði at lata blóð.

- Tá sat mann í einum vanligum stól, nú mestsum liggur mann, og umstøðurnar eru í allar mátar vorðnar nógv betri, sigur Heðin Mortensen.

Í heila tikið hevur tað ikki nógv upp á seg at lata blóð.

- Tað tekur hálvan til ein tíma um árið at vera blóðgevari, og tað mugu øll væl hava tíð til, sigur Heðin Mortensen.



*Borgarstjórin, Heðin Mortensen, gav blóð fyri 50. ferð í gjár, og sum viðurkenning fekk hann gullnál og eina reyða rósu*

*Mynd: Leo Poulsen*